# LEIÐARI TIL 2X3

## HEVUR TÚ HUG AT LEIÐA 2X3 INN Í FRAMTÍÐINA



**Sum leiðari**
Fært tú latið upp í hendur at menna og leiða ein sera áhugaverdan handil. Tú fært ábyrgd og leiðslu av dagliga rakstrinum í handlinum, og við málsøkni og planlegging skal tú tryggja, at 2x3 konceptið við nøktandi úrsliti røkkur málum, sum tú verður við til at seta.

**Uppgávur tínar**
Fevna um leiðslu, planlegging og menning av øllum rakstrarøkjum, ið hava beinleiðis samband við vanliga raksturin av 2x3. Tú skal umboða handilin úteftir, samstundis sum tú skalt virka fyri, at drívmegi er í handlinum, soleiðis at málini verða rokkin.

**Vit krevja**
At tú ert ein álítandi persónur, sum hevur evnini at leiða eitt virkið arbeiðspláss. Tú hevur fakligu evnini, áræði og kreativitetin, ið skal til fyri at reka ein handil í eini vinnugrein, ið er merkt av sera harðari kapping. Tú hevur evnini at brynja 2x3 til avbjóðingar, ið liggja fyri framman. Tað skal fella tær náttúrligt at arbeiða sjálvstøðugt, og at skipa arbeiðisviðurskifti hjá øðrum.

**Tínar kvalifikatiónir**
skulu byggja á hægri útbúgving innan øki, ið mugu metast at stuðla tær í einum starvi sum leiðandi persónur. Royndir innan vinnulív, t.d. leiðslu í eini profitskapandi organisation og fakkunnleiki innan byggimarknað e.l. eru sera viðkomandi.

**Frá okkum**
Fært tú bjóðað eitt sera spennandi og vællønt starv, har tú innan tryggar karmar verðuliga fært møguleikan at royna tíni evni. Í samstarv við stjóra verður tað tú, ið skalt fyriskipa flestu viðurskifti í 2x3.

**Freistin**
At søkja starvið er 30. september 2006. Miðjað verður eftir at seta starvið í seinasta lagi tann 1. december 2006. Umsókn saman við viðkomandi skjølum, skal sendast til:

**Timburhandilin**
Heykavegur 4
Boks 3038
110 Tórshavn
Att: Jørmann Petersen, stj.

2X3

TIMBUR HT HANDILIN
TÓRSHAVN • KAMBSDALUR




## Gellan letur upp 25. oktober

Til okkara nýggja handil í nýggjum umhvørvi, sóknast vit eftir dugnaligum starvsfólkið, ið kunnu lyfta stórum avbjóðingum.

Vit ímynda okkum, at tey, ið søkja størvini antin hava handilsligar royndir ella í minsta lagi ein alsk til klæði, snið og móta.

## Starvsfólk

Fulltíðarstarv,
hálvtíðarstarv og starv
eftir skúlatíð

Umsóknir, ið skulu vera okkum
í hendi innan 20. september
skulu sendast til:

P/f Skálkur, SMS,
Húsagøta, 100 Tórshavn.
Tel. 31 54 00
Att.: Lars Müller

gellan®